# Rituvíkin varð n

**- Tey fyrstu árini var tað so, at konurnar bóru fiskin Heim í Heiðar, meðan menninir fingu sær eina stutt hvíld, inntil næsta túr. - Eini 200 pund ella meir høvdu tær í leypinum, umframt barnið, ið tær oftast bóru undir beltið. Eini 10-12 børn fingu allar tær fyrstu konurnar! Tí bleiv Rituvíkin eisini viðhvørt nevnd *"Barnavíkin", segði Dánjal Petur Højgaard í røðu síni á mentanartiltakinum á Støðni í Rituvík seinasta leygarkvøld***



RØÐA

Gott kvøld, góðu gestir og sangarar! Bygdarfólk, eins og avbygdarfólk!

Tað var formaðurin í Kór Glyvra Kirkju, Marita Joensen, sum bað meg siga nøkur orð um staðið her vit eru stødd. Tað skal eg royna at gera nú, samstundis sum eg flætti uppí nakrar frásagnir frá fólki, egnar upplýsingar og brot úr bókmentum annars.

Vit eru nú stødd NIÐRI Á STØÐNI. Soleiðis kallaðu vit í bygdini hetta staðið — og soleiðis hava so mangar aðrar útróðrarbygdir kalla staðið, har lívæðrin í bygdini var:

• staðið har fiskurin kom upp á land,
• staðið har bátarnir blivu drignir av lunni og hildu til havs, út á fiskimiðini,
• á handilsferð, eftir lækna ella eftir jarðamóðir.

Ørindini kundu verða so nógv. Her í Rituvík hevði t.d. eisini torv-søla stóran týdning. Torvið varð selt til Havnar.

Vit hava nú eina løtu lýtt á tónar, ljóð og løg frá Kór Glyvra Kirkju . — Ótrúliga flott — sum væntað! — Ein gerst stoltur av, at tað ber til at syngja so gott og so vakurt her á landi! Um eina løtu sleppa vit enntá at hoyra víðagitna operasangararnar Susanne og Rúna Brattaberg. Tað gleða vit okkum eisini nógv til!

### Ritu-karr

Vit kunnu so seta fram hendan spurning:

Hvørjir tónar, ljóð og løg hava verið at hoyrt fyrr í tíðiniá hesum leiðum, her sum vit standa nú?- Kanska vóru tað ritu-karr í teim fyrstu fleirraddaðu kórunum á hesum stað?- Á tíðarinnar morgni so at siga. - Men, síðan komu fólkini. Tey fyrstu í 1873, fyri skjótt 132 árum síðan.

Teir fyrstu tónarnir hjá teimum vóru sálmar, skjaldur, vøgguvísur og kvæði. — Her sum vit standa hevur tað mest verið sálmarnir.

Men umhvørvið uttan um okkum hevur givið nógv ymisk ljóð í ymsum rútmum og styrki:

Á sumri bleytasta pianissimo frá alduskvatli, á vetri harðasta forte frá alduduni og øgiligum brotum.Í omanlopi jarðskjálvta-rystingar um alla bygdina. Hugsi ikki, at nakað rokk-orkestur kundi havt gjørt tað betri!- Alt samalt í kontrasti til... seigligu áratøkini.... reglu-liga hvínandi í homlubandi....sálmarnir. Seinni teir klikkjandi motorarnir, og sálmasangurin fánaði burtur her, men tók seg upp aftur í Missiónshúsinum, bygt í 1935 og í Kirkjuni, bygd í 1955. Sostatt hava hesi Guds-húsini í ár síni 70 og 50 ár á baki í hesum árinum.

Mær er sagt, at seinastu ferð, at rituvíkingar sungu á báti var undir krígnum, eftir grindaferð úr Klaksvík. Tað skuldi ljóða serstakliga væl — tí góðar vóru røddirnar! Hyggi eg eftir kórinum, ið her stendur, so eru ikki so fá í ætt við frægar sangarar her í bygdini. — Tað verður sagt her á staðnum, at tey mest edlu sang-genini skuldu koma úr Suðri. — Gen, sum ala fram serliga sterk og vælljómandi stemmubond, ið geva klangfullan sang. — Um venjing og dirigering í ávísan mun hevur verið til staðar. - Tak bara Rúna Brattaberg, sum bleiv hálaður oman í Ljóm í Vági, tí ein bassur manglaði. Hann vísti seg at vera ein sannur sang-diamantur av høgum karati, sum nú er slípaður til og kann skyggja í øllum sang-klangum og hvat tað skal vera..

Sagt verður, at alt í lívinum gongur í ring. Soleiðis møtast í kvøld suðrisku sang-genini í kórinum við suðrisku sang-genini hjá Rúna aftur her í fjøruni í Rituvík!

### Eingir bilar

Vit venda aftur til ljóðini her á staðnum.Eg kann sjálvur minnast hesi ljóð:

...tað ríkjandi hvinið, tá ið báturin verður drigin upp, knarrið eftir lunnunum, sum vit nú sita á!.... fiskarnir, ið smella niður á helluna. Ella tey meira hulisligu ljóðini, tá ið fiskurin verður koyrdur leypin. - Hetta síðsta kanska eftir at fiskabýtið hevur verið:... "Hvør skal eiga handan partin"?..... "Tú sjálvur", plagdi Edvard-abbabeiggi at siga, tá ið vit høvdu býtt fiskin..... og so tey tungu **fótafetini** frá monnum ella dreingjum, ið fara niðan brekkuna við leyp á baki, við fiski í.... tí tá vóru jú ongir bilar!

Jú, her á staðnum hevur nógv gingið fyri seg. Lat okkum t.d. leggja oyra til nøkur ørindi úr yrkingini "Tollaksmessudagur 1913", hjá Nancy Vesturbú, í bókini "**Rit og yrkingar**" frá 1987, s. 86-88: (eg taki yrkingina í trimum pørtum)

*1. Smidligt er farið, ið fram eftir stevnir,*
*seks mans til ára úr støðni avstað,*
*náttin er vøkur, tó hvør maður kennir*
*løtan má brúkast, brátt skifta kann lag.*

*2. Á Tollaksmessu nú nær jólum,*
*hoyrdist frá bátinum sálmakent lag,*
*stjørnurnar bjartar og stilli í sjónum,*
*dýrdin var føgur, teir sannaðu tað.*

Hetta er í tíðini, áðrenn motorarnir komu til bygdina. — Eins og í øðrum føroyskum bygdum fóru bátarnir syngjandi frá landi — og komu syngjandi aftur at landi — um teir slitu upp land. —

Rituvík hevur verið ein útróðrarbygd í so at siga 100 ár. — Niðursetufólkini høvdu bøin og bátin og Várharra at líta á. — Á minnisvarðanum haruppi standa so rámandi hesi orð: TANN KRAFT SUM TEIMUM TREYSTI GAV VAR LÍT TIL GUD OG LAND OG HAV.

Tann fyrsta lendingin í Rituvík var ikki tann, ið vit standa á nú. Heldur ikki tann vestanfyri — ("Frederikshavn"), á Kráargili, har ternurnar gjørdu, at vit fluttu hetta tiltak her til.

### Barnavíkin

Teir fyrstu niðursetumenninir høvdu í nøkur ár bát — 4-mannafar — YVIRI Á SKARVATANGA. - Vit hóma tangan stinga út undan har eystanfyri okkum.... Seinni varð lendingin flutt higar, vit nú eru stødd. Ein breiður træstigi rakk upp á eina rók, ið gekk framvið innara borði á dráttrinum. — Tað kundi taka tímar at fáa bát á sjógv — ella at fáa hann upp. Eitt øgiligt knoss, ið torført er at skilja í dag, at tað bar til.

*Menninir* róðu út á hav tey fyrstu nógvu árini. Hetta tók einar 4-6 tímar hvønn vegin, um væl gekst í hond! Tí bleiv tað soleiðis tey fyrstu árini, at *Konurnar* bóru fiskin Heim í Heiðar, meðan menninir fingu sær eina stutt hvíld, inntil næsta túr.- Eini 200 pund ella meir høvdu tær í leypinum, umframt barnið, ið tær oftast bóru undir beltið. Eini 10-12 børn fingu allar tær fyrstu konurnar! — Tí bleiv Rituvíkin eisini viðhvørt nevnd "***Barnavíkin***"!

Men rituvíkingar áttu ein sera góðan vin og framtaksmann í "Per í Heiðunum" (Per Nielsen). Hann hevði handil heimi í Heiðum, higar konurnar komu knossandi við fiskaleypum. — Hann tók stutt og greitt og bygdið eitt stórt fiskahús heir heimi við ánna. — Og tann grundin er til enn.

Tá bleiv høgligari at avreiða.

Tann stóra hellan, ið vit síggja hiðani og HEIM Í KÓS var øll nýtt til at turka fisk á — klippfisk. Fiskur varð eisini turkaður á HELLUNI Á KRÁARGILI.

Tí liggur vegurin so mikið niðarlaga ÚTI Í SKÁK, og tí gongur INGUSA ENDI oman á KRÁARGIL, har bátadrátturin kom fyri uml. 30 árum síðan. Skip løgdu haraftrat fisk upp at turka í Rituvík, tí hellan var so víð og sólargangurin góður.

Í mínari tíð kann eg minnast, at fiskur hevur verið saltaður uppí í saltfiska-húsinum hjá Andreas Andreassen, keypmanni. Tað er taðgráa húsið við reyðum taki, beint omanfyri neystini.

Tíðirnar skiftu. Útróðurin fánaði. Menn fóru við trolara ella uppá langfart. Ungfólk funnu enntá uppá at fara í skúla, ið ikki beinleiðis førdi til sjóvinnu.

### 77 navigatørar

Tað var Olivur Andrassen, sáli, ið segði mær, at einaferð sigldu út frá Rituvík ikki minni enn 77 navigatørar — fólkatalið var tá bert eini eini stívliga 200 fólk!

So nógv íkast hevur hendan bygdin givið til landsbúskapin. So nógv hevur tað at siga, at menn alast upp á einari støð sum hesari, fyri síðani at kunna fara longur út á havið!

Vit venda aftur til yrking-